# Trygd bjóðar nú kundunum snarhjálp

*Trygd bjóðar í dag kundum sínum eina ískoytistrygging til skrokkbiltryggingina. Talan er um samstarv við Sløkkiliðið í Havn og átta bilverkstøð kring landið, sum veita kundunum snarhjálp, um okkurt er áfatt við bilinum*




*Peter Seloy, brandmeistari í Havn og Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd eru nú klárir við startkáplunum. Við at ringja 321312 fáa kundarnir hjá Trygd skjóta - og ókeypis - hjálp, um bilurin steðgar upp*

**Mynd: Jensk Kristian Vang**

EIRIKUR LINDENSKOV

Startar bilurin ikki um morgunin, ella er hann punkteraður, ella er okkurt annað áfatt, sum ger, at tú ikki ført koyrt, ja, so er bara at ringja 321112, sum er hjálpartænastan hjá Trygd-Bilhjálp, ið er nýggj tænasta, sum tryggingarfelagið Trygd nú bjóðar viðskiftafólki sínum.

– Talan er um eitt samstarv millum vaktartænastuna hjá Tórshavnar Sløkkiliði og Trygd, sigur Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd.

– Hetta er eitt autohjálparkonsept á sama hátt, sum vit kenna tað hjá Falck í Danmark. TrygdBilhjálp hevur samstarvsavtalu við Falck, sum umboðar TrygdBilhjálp í Evropa, eins og TrygdBilhjálp er umboð hjá Falck í Føroyum. Tískil er tænastan ikki bert galdandi í øllum Føroyum, men í øllum Evropa.



– Um vit so eru á Viðareiði ella í Palermo á Cecilia, sum Christian C. Nielsen málber seg.

Einki fyri einki, staðfestir Christian C. Nielsen. Hendan tænastan hjá Trygd kostar kundunum 350 krónur um árið, og heldur hann tað vera sera lagaligt, borið saman við, at tilsvarandi gjald hjá Falk kostar 649 krónur.

Gjaldið upp á 350 krónur er galdandi fyri bilar, sum eru seks ár og yngri. Er bilurin eldri enn seks ár, verður gjaldið 450 krónur, tí roknað verður við fleiri trupulleikum av gomlum bilum.

Christian C. Nielsen sigur, at tað ikki er óvanligt, at tryggingarfeløg bjóða kundum slíkar tænastur, og leggur afturat, at hetta er vanligt eitt nú í Danmark, Noreg og Svøríki.

Umframt avtaluna við Sløkkiliðið í Havn, so hevur Trygd avtalur við átta verkstøð kring landið, so kundar í øllum landinum fáa somu tænastu.

Tænastan hjá TrygdBilhjálp umfatar alla vanliga hjálp á staðnum, so sum starthjálp ella tað, at lykilin er innilæstur. Eru tað størri uppgávur, so verður bilurin fluttur á verkstað, uttan at kundin skal gjalda fyri tað.

Skal bilurin á serligt verkstað - tað verkstaðið, sum umboðar ávísa bilmerkið, so syrgir TrygdBilhjálp eisini fyri tí.

# Gøtubørn fingið nýggjan barnagarð

ORÐ OG MYNDIR
JONHARD HAMMER

Seirnapartin hósdagin var barnagarðurin í Gøtu tikin alment í nýtslu. Skipað varð fyri stórfingnari móttøku í barnagarðinum. Um dagin var móttøka fyri innbodnum, og um kvøldið var so barnagarðurin latin upp fyri børninum



*Tórgerð Hansen, leiðari í barnagarðinum, fær fotoalbum frá fyrrverandi dagrøktarleiðaranum, Súsanna Joensen*



*Andreas Petersen, Pauli Jarnskor, bygdaráðslimir og Jógvan Gregersen, bygdaráðsformaður*

### Vælnøgdur bygdaráðsformaður

Jógvan Gregersen, sum er bygdaráðsformaður, er sera væl nøgdur við barnagarðin. Hetta er ein ætlan, sum vit hava arbeitt leingi við. Tað eru seks ár síðani, vit fóru undir fyrireikingar arbeiðið til henda barnagarðin. Tað er ikki byggingin, sum hevur tikið langa tí, men tann politiska prosessin hevur tikið næstan seks ár, sigur Jógvan Gregersen.

Tað var í 1997, at bygdarráðið valdi at fara undir byggingina. Elias Hansen, byggifrøðingur, varð settur at projektera barnagarðin. Hann kostar 2,5 milliónir, sum hann stendur í dag. Hetta er eitt sindur meira enn tað var projekterað. Grundin til, at hann bleiv eitt sindur dýrari er, at tað kom inflatión í byggivinnuna og kanska tí at bygdarráðið valdi at gera ein nýtímans stovn við øllum hentleikum til børnini, sigur Jógvan Gregersen. Ein onnur orsøk til at barnagarðurin gjørdist dýrari var, at bygdarráðið valdi at økja um barnatalið. Sum nú er, er pláss fyri 65 børnum í barnagarðinum, so vit halda, at vit hava fingið nógv fyri pengarnar, sigur Jógvan Gregersen og leggur aftrat, at hetta man verða ein tann bíligasti av sínum slag í Føroyum.

### Flott handverk

Barnagarður í Gøtu er eitt flott handverk, og arbeiðið hevur gingið sera væl, sigur Jógvan Gregersen. Tað er Elias Hansen, sum hevur projekterað og havt eftirlit við byggingini. Svenn Olsen, byggimeistari úr Gøtu, hevur staðið fyri øllum arbeiðinum av Barnagarðinum.

### Børnini á vitjan

Klokkan hálvgum sjey vórðu víngløsini og pinnamaturin sett til síðis. Og slikkipinnar, Pop Top og annað góðgæti var sett fram til børnini, sum komu at vitja. Hetta var ein stórur dagur hjá børninum í Gøtu. Barnagarðurin hevur allar teir hentleikar, ein kann ynskja sær, og so liggur hann eisini við skúlan, so ein kann brúka fimleikarhøllina og svimjihylin. Eitt annað, sum er sera týdningarmikið við einum barnagarði er fólkið, sum skal arbeiða har. Torgerð Hansen er sett sum leiðari. Hon hevur hollar royndir innaan barnagarðsarbeiði. Seinastu árini hevur hon verið leiðari á barnagarðnum í Fuglafirið.

### Fólkatali í Gøtu veksur

Í dag búgva 959 fólk í Gøtu Kommunu, og hetta er næstan líka nógv, sum tá ið tað búðu mest í kommununi, nevnliga 987 íbúgvar, sum var í 1990. Í 1995 búðu einans 859 íbúgvar í kommununi. Barnatalið í løtuni er: 0-3 ár 49 børn, 4-7 ár 52 børn og frá 8-10 ár eru 60 børn. Hesi tøl vísa á at burðartalið er í vøkstri aftur, og tað er ein fyritreyt fyri at hava eina góða samanseting av íbúgvarum í einari kommunu.



Nýtt ískoyti til skrokktryggingar
**TRYGD** *Bilhjálp*










# Í morgin kann tað verða títt tørn...

Vit kenna tað øll: Bilurin hevur mist streymin, hann er punkteraður, einki brennievni er eftir, ella hann vil ikki koyra meira, og vit sleppa ongan veg.

Er bilurin skrokktryggaður í Trygd, kanst tú fáa ókeypis hjálp við at tekna **Trygd Bilhjálp**.

**Trygd Bilhjálp** fevnir m.a. um útreiðslur til t.d. starthjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi trupulleikar við bilinum.

Við **Trygd Bilhjálp** ført tú hjálp um alt landið og nærum um alt Europa.

Trygd samstarvar við Falck í Danmark, soleiðis at tú við **Trygd Bilhjáp** fær somu tænastur, sum viðskiftafólkini hjá Falck.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Skaðatænastuna hjá Trygd ella til Falck, um tú ert uttanlands, og vit senda tær hjálp.

Við **Trygd Bilhjálp** ført tú hjálp alt samdøgrið, alt árið, um tú ert í Klaksvík ella í Palermo á Sicilien, uttan at tú skalt hugsa um rokningina.

**Trygd Bilhjálp,** ið er eitt ískoyti til skrokktryggingarnar hjá Trygd, kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

***Vit selja ikki tryggingar, men trygd.***

**TRYGD**

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

petur & petur • 320870